# Góðu gomlu Frændur

**Frændurnir úr Klaksvík hava tað framvegis í sær. Teir duga at undirhalda og at fáa áhoyrararnar við sær á konsertum. Tað prógvaðu teir enn einaferð á Nýggjárskonsertini í fjør, sum var 29. desember**

NÝGGJÁRS-KONSERTIN

*Stefan í Skorini*

Frændur megnaðu veruliga at fáa gongd í áhoyrararnar á Nýggjárskonsertini fríggjakvøldið. Nógvir ungdómar høvdu leitað sær niðan í høllina á Hálsi at lýða á, og tey hugnaðu sær óført við tónleikinum frá Frændum, sum nú kann sigast at vera fólkaogn.

Hóast tað eru seytjan ár síðani, at Frændur fóru undir at spæla regluliga, so hava teir ikki mist tann eldhugan, sum hevur eyðkent teir, síðan teir byrjaðu í 1983. Teir tríggir Eyðun Nolsøe, Rani Nolsøe og Steintór Rasmussen vóru enn einaferð á palli, og tað fekk hjartað at pumpa skjótari hjá fleiri, sum vóru til staðar.

Frændur er tann eldsti føroyski tónleikabólkurin, sum framvegis veruliga er virkin. Hann hevur nógv ár á baki, og er tann bólkurin, sum tey flestu vilja hoyra við eitt slíkt serstakt høvi sum á nýggjárinum.



*Rani Nolsøe brillieraði á el-gittarinum. Teir vóru annars allir væl upplagdir*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Kendir sangir

Tað vóru ikki nógvir nýggir rættir, sum Frændur borðreiddi við á konsertini. Tað varð heldur ikki væntað frammanundan, og áhoyrararnir vilja eisini hoyra nógv av tí góða, gamla tilfarinum frá Frændum, har boðskapurin er kærleiki, friður og sosialisma.

Áhoyrararnir vildu hoyra løgini, sum vit øll kenna væl og kunnu syngja við til. Tað var eisini tað vit fingu.

Hvørja ferð Frændur eru á palli, spæla teir tær góðu, gomlu landaplágurnar frá teimum fyrstu útgávunum frá miðskeiðis í 80-unum. Hesi kunnu eisini framvegis røra fjøldina, sum tey gjørdu fyrr.

Evergreens sum Hundurin Brúni, Eros og Føroyar, ið komu út fyri eini fimtan árum síðani, eru framvegis floorfillers og ógvuliga væl dámd millum manna.

Hesir sangir hava í dag fingið tann status í Føroyum, at teir verða sungnir til veitslur og prentaðir í sangheftum.

Millum tey eldru løgini vóru eisini nøkur av teimum nýggjaru, ið eru á útgávum frá teimum seinnu árunum, har ikki allir limirnir í Frændum hava verið við.

### Væl upplagdir

Tað sást á øllum brøgdum, at tónleikararnir, sum stigu fram á pallin miðskeiðis í høllini, vóru væl upplagdir. Tað hoyrdist væl, at teir eru væl samanspældir. Teir tríggir hava eisini spælt saman í nærum tjúgu ár. (Vit bíða spent eftir at síggja, hvat verður gjørt burturúr tjúgu ára degnum, sum verður um trý ár)

Rani spældi el-gittar, yngri bróðirin Eyðun spældi akkustiskan gittar, meðan Steintór Rasmussen sang fleiri av sangunum. Erik Biskopstø var á bassinum og Høgni Klakkstein sló á trummurnar.

Tað er einki, sum bendir á, at bólkurin hevur mist sambandið við ungdómin, hóast teir allir hava rundað tey tredivu árini. Teir høvdu allatíðina gott samband við áhoyrararnar, og tað var við til at gera konsertina enn betri.

Tað er kanska vert at leggja til merkis, at umleið ein helmingur av áhoyrarunum ikki vórðu føddir ella gingu framvegis við blæðu, tá Rani, Eyðun og Steintór fyrstu ferð trinu fram á føroyska tónleikapallin í 1983.

### Umaftur

Tað tóktiskt ikki, at fólk vildu hava teir at gevast, tí tá konsertin leið móti endanum út ímóti hálvgum fýra á morgni, kunngjørdi Steintór, at teir fóru at gevast.

Tá kom róp í fjøldina, sum rópti »umaftur, umaftur«.

Teir eftirlíkaðu kravinum frá fjøldini og spældu tríggjar sangir umaftur, sum teir longu høvdu spælt fyrr í konsertini.

Tað vóru Eros, Føroyar og Lívsmynd. Hetta eru sangir, sum ikki ber til at sleppa uttanum, tá talan er um Frændur. Hesir hava eisini tann týdningarmesta boðskapin, sum Frændur hava at bera.



*Høgni Klakkstein er nýggi trummusplarin hjá Frændum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Ungar gentur í góðum hýri*

*Mynd: Jens Kr. Vang*





# Túsundárahaldið er av

**Tað var ein sera fjølbroytt gudstænasta í Dómkirkjuni í Havn nýggjársdag. Umframt kantatuna hjá Kára Bæk og prædiku frá Bjarna Bæk var eisini lovsongur frá hvítusunnusamkomunum at hoyra, og aðrar samkomur høvdu síni innlegg. Bert spell, at kirkjan ikki var full á hesi fagnaðargudstænastu**

FAGNAÐAR-GUDSTÆNASTA

*Stefan í Skorini*

Gudstænastan í Dómkirkjuni nýggjársdag fekk heitið fagnaðargudstænasta. Hetta var tí, at hon markerar endan á einum fagnaðarári, har tað hevur verið hátíðarhildið, at Føroyar hava verið kristnar í 1000 ár.

Tað var mikið kjak um, hvørt Føroyar vórðu kristnaðar í ár 999 ella í ár 1000. Komið varð tó fram til, at fagnaðarárið skuldi vera í ár 2000, sum nú er farið afturum bak.

Stýrisbólkurin, sum hevur staðið fyri at seta í gongd og samskipa øll tiltøkini, hevur havt hendurnar fullar, tí sera nógv ymisk tiltøk hava verið á skránni.

Krúnan varð sett á verkið í Dómkirkjuni, har skipað varð fyri fagnaðargudstænastu við luttøku frá fleiri trúarbólkum.

Fyri einum ári síðani var eisini fagnaðargudstænasta í Dómkirkjuni. Tá varð hetta fagnaðarárið alment sett við luttøku frá teimum trúarbólkum, sum hava luttikið.

### Fjølbroytni

Tað, sum eyðkendi gudstænastuna, var fjølbroytni.

Lagt varð fyri við kantatuni »Harri Vár Dráttin« hjá Kára Bæk. Kantatan er fyri sopransolo, kór, tvær trompetir og tvær trombonir.

Um fólkið ikki fylti kirkjuna hetta kvøldið, so fylti hesin tónleikurin so sanniliga kirkjuna. Kári Bæk var sjálvur leiðari. Tað var eisini stuttligt at síggja mann, konu og dóttir luttaka. Kona Kára, Marjun Bæk, og dóttirin ,Kristin, vóru við í kórinum.

Gudstænasta varð send beinleiðis í sjónvarpi og útvarpi, og tað hevði við sær, at fleiri valdu at sita heima og lýða á.

Síðani varð vanligur sálmasangur aftur sungin, áðrenn deknur og bispur sluppu framat.

Við í fagnaðargudstænastuni vóru eisini umboð úr øðrum trúarbólkum. Hesi settu eisini sín dám á gudstænastuna.

Katólski diakonurin Christian Gabrielsen las fyrsta evangeliið. Presturin í Adventistakirkjuni, Jens Vilhelm Danielsen, las úr Josva kapittul 8, tá ísraelsfólk fór yvir um Jordan ánna. Hann legði í sínari talu dent á, at Gud framvegis ikki hevur slept valdi og ávirkan síni á søguna.

Síðani bar eitt lítið kór úr hvítusunnusamkomunum fram lovsong. Tað er ikki á hvørjum degi, at so lívligur tónleikur er at hoyra í fólkakirkjuni, og tað var stuttligt at síggja.

At enda prædikaði Bjarni Bæk, og Frelsunarherurin spældi horntónleik.

Bjarni Bæk segði í prædiku síni, at vit eiga at halda fram við óttaleys at tæna Gudi og at líta á, at Harrin fer at fullføra gerning sín í Føroyum.

Hann legði harumframt dent á, at hóast tey hava verið ymisk, so hava tey staðið saman í hesum fagnaðarári.

### Torførar arbeiðsumstøður

Stýrisbólkurin, sum hevur fyrireikað túsundárahaldið, varð settur í november 1997. Tá varð farið undir at fyrireika fagnaðarárið.

– Tað hevur verið ógvuliga torført hjá okkum at leggja tær endaligu ætlanirnar, tí vit hava ikki altíð vitað, hvussu nógvan pening vit hava havt tøkan, sigur Niklas Foldbo, sum hevur verið í stýrisbólkinum.

– Tað torførasta hjá okkum hevur verið, at hava samsvar millum tiltøkini og peningin. T.d. fingu vit ikki endaliga trygd fyri teimum seinastu pengunum fyrr enn í september í ár, sigur Niklas.

Hann sigur eisini, at eftir umstøðunum er hann væl nøgdur við tað, sum stýrisbólkurin og ráðið hevur fingið at skafti, síðan tey byrjaðu.

Um hann skal taka nakað tiltak fram, sum nakað serligt, so er tað sunnudagsskúlin á Svangaskarði, har 5000 fólk vóru komin saman ein fagran summardag og fagnaðargudstænastuna, sum var í Dómkirkjuni á hvítusunnu, har fleiri danskir bispar luttóku.